

Liðið í recurve-skjótingini var í flokki fyri seg og var langt framman fyri næsta liðið. Her fegnast Absalon Hansen, Rógvi Mohr og Annika Vang um gullið

# Pílar og skot, Føroyar!

**Føroyskir bogaskjúttarnir gjørdu eitt rættilig skjótálop á Oyggjaleikunum, og eftir einum degi vunnu føroyingarnar gull í tveimum liðkappingum og fingu gull, silvur og bronsu í einstaklingakappingini**

BOGASKJÓTING

*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Føroysku bogaskjúttarnir høvdu ein gyltan dag í Lerwick hósdagin.

Kappast var í sonevndu head-to-head kappingini, og her vóru føroysku skjúttarnir rættiliga stinnir. Bæði í compound og í recurve fyri einstaklingar komu føroyingar í finaluna, og í aðrari finalui eydnaðist tað at vinna gull.

Tað var í compound, har Jógvan Niclasen kláraði at toga seg um kappingarneytan, hóast hann í fyrsta umfarinum hevði eitt vánaligt skot og kom trý stig aftarum.

– Tað eru ikki so nógvir pílar at gera gott við í hesari kappingini, men eg royndi mítt besta, og eg kláraði at koma trý stig fram um hann, sigur Jógvan Niclasen.

Schandorff Vang fekk bronsu í compound-kappingini.

### Liðini vóru suveren

Í recurve skjótingini var Absalon Hansen í finaluni, og hóast hann hevði munin eftir seks teir fyrstu pílarnar, skjeyt hann so illa í triðja umfarinum, at hann reyk aftur um, og hann kláraði ikki at taka seg fram um aftur unga skjúttan av Ynes Mon.

– Hatta var bara av nervum. Hann er ikki betri skjútti enn eg, men eg kiksaði nøkur skot, og so var einki at gera, sigur Absalon Hansen.

Hann kundi tó fegnast um, at hann skjeyt væl í finaluni fyri lið í recurve, og har eydnaðist tað honum, Rógva Mohr og Anniku Vang at vinna gull við stórum muni.

Føroyska liðið legði seg fram um beinanvegin, og leiðslan bara vaks fram móti endanum.

Í compound-skjótingini høvdu Schandorff Vang, Jógvan Niclasen og Sigrid Vang munin allatíðina. Hjá teimum var munurin ikki so stórur sum hjá recurve-skjúttunum, men compound-liðið fekk eisini gullið heim.

# Kvinnurnar hevndu tapið hjá Jacob

**Fyri 35 árum síðani tapti hjálparvenjarin hjá fótbóltskvinnunum ein dyst á leikvøllinum í Scalloway. Hósdagin fekk hann hevnd við hjálp frá kvinnulandsliðnum**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Scalloway:** Í 1970 spældi føroyska fótbóltslandsliðið ein dyst ímóti Scalloway á Fraser Park. Tað gekk einki serligt, tí tað sterka liðið hjá Scalloway vann heili 5-0. Ein av spælarunum á føroyska landsliðnum var Jacob Thomsen, sum nú er hjálparvenjari hjá føroyska kvinnulandsliðnum í fótbólti, og hósdagin vitjaði hann aftur á Fraser Park.

– Eg kendi beinanvegin hetta stadionið aftur, tá vit komu her at spæla í dag. Eg minnist húsini rundan um og vøllini, segði Jacob Thomsen, eftir at dysturin hjá kvinnunum var av.

### Fekk hevnd

Hetta var fyrsti landsdysturin millum fótbóltskvinnurnar hjá Føroyum og Hetlandi, og hann varð spældur júst 75 ár eftir, at Føroyar og Hetland spældi fyrsta landsdystin hjá monnum.

Og Jacob Thomsen fekk hevnd, nú hann vitjaði aftur á Fraser Park. Kvinnulandsliðið bukaði vertirnar av, og sigurin gjørdist heili 9-1.

Hetlendska liðið, sum als ikki stóð mát við føroyska liðið, kláraði tó at javna leiðsluna hjá føroyska liðnum, men so koyrdi tokið, og Føroyar skutu átta mál afturat.



Jacoba Langgaard spældi allan dystin á miðvøllinum, og hon gjørdi seinasta føroyska málið ímóti Hetlandi

**Oyggjaleikir, 4. umfar, 14. juni 2005**

**Føroyar-Hetland 9-1 (4-1)**

1-0: Malena Josephsen, 11.
1-1: Lisa Johnston, 21.
2-1: Mary-Ann Isaksen, 26.
3-1: Rannvá Andreassen, 33.
4-1: Rannvá Andreassen, 34.
5-1: Ása Dam á Neystabø, 52.
6-1: Malena Josephsen, 56.
7-1: Elin Katrina Haraldsen, 77.
8-1: Ása Dam á Neystabø, 78.
9-1: Jacoba Langgaard, 83.

**Føroyar:** Laila Jespersen – Ann Olsen, Bára Skaale Klakstein, Unn Kragesteen, Súsanna Hansen – Ása Dam á Neystabø, Rannvá Augustinussen (Sólvá Joensen, 61.), Jacoba Langgaard, Mary-Ann Isaksen – Malena Josephsen (Elin Katrina Haraldsen, 61.), Rannvá Andreassen (Rakul Magnussen, 46.)